## Estee Lauder sigur upp

Amerikanska smyrslfyritøkan Estee Lauder kunngjørdi í gjár, at hon fer at siga 2.000 fólkum úr starvi í næstum fyri at bøta um raksturin. Fyritøkan sigur, at vinningurin minkaði næstan 30 prosent teir seinastu tríggjar mánaðirnar í fjør. Hetta tíðarskeiðið var vinningurin 158 milliónir dollarar ímóti 224 milliónum dollarum somu mánaðir í 2007. Sølan minkaði eisini. Seinasta ársfjórðingin í fjør seldi fyritøkan fyri góðar tvær milliardir dollarar, sum var 11,6 prosent minni enn í oktober ársfjórðingi í 2007.



## Hevur 24 fingrar og tær

Á einum sjúkrahúsi í Kalifornia hevur ein kvinna átt ein drong, sum hevur seks fingrar á hvørjari hond og seks tær á hvørjum fóti. Í læknavísindini eitur hetta fyribrigdið polydactylism. Tað er ikki óvanligt, at børn verða fødd við fleiri fingrum ella tóm enn vanligt, men sambært læknunum er tað sjáldsamt, at børn hava 12 fullbornar fingrar og 12 fullbornar tær sum hesin drongurin. Ein barnalækni á sjúkrahúsinum sigur við AP, at drongurin verður ivaleyst óførur klaver- ella guitarleikari, tá hann verður vaksin.

# Flakatrolarar rokfiskiskap í gráu leiðini




*Sonna Johannesen, skipara, dámar væl, tá tað er rokasligt, og nú liggja hann og manning hansara í rokfiskiskapi í gráu leiðini, samstundis sum Noregs-sáttmálin er komin upp á pláss*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Seinastu dagarnar hava Enniberg og hinir flakatrolararnir, sum enn royna í gráu leiðini, havt rættiligan rokfiskiskap. Fiskiskapurin er so góður, at Enniberg lá stillur, og manningin arbeiddi undan, tá vit høvdu reiðaran í telefonini í morgun. Soleiðis, sum gongdin er í løtuni, fáa teir eini 25 tons av flaki lastina um samdøgnið**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá flakatrolararnir herfyri noyddust at rýma úr norskum sjógvi, tí norðmenn settu seg upp á afturbeinini, tá teir í fyrstu syfti ikki kundu fáa meginpartin av eykakvotuni av makreli, lógu skipini í góðum fiskiskapi.

Úr norskum sjógvi fóru flakatrolararnir í gráu leiðina, har fiskiskapurin hevur verið misjavnur. Í byrjanini vóru skipini heppin og fingu skipini væl, men síðan fingu tey minni.

Beint áðrenn samráðingarnar millum Føroyar og Noreg um nýggjan fiskirættindasáttmála komu upp á pláss fyrr í hesi vikuni, brendu skipini í rættiligan rokfiskiskap í gráu leiðini.



*Teir liggja í rokfiskiskapi í gráu leiðini. Nógv meira fiskur er at fáa, enn maskinur og manning megna at arbeiða undan. – Vit kunnu ikki fiska meira, enn vit klára at arbeiða undan, men vit spara olju, sigur reiðarin, Mortan Johannesen*